Á fundi vi› serfrø›ingar um fullveldismáli›

Umbo› fyri føroysku flokkarnar vóru í gjár á fundi vi› f‡ra høgt mettar, útlendskar stjórnmálafrø›ingar um ríkisrættarligu stø›u Føroya

JOHN JOHANNESSEN

Føroyskir politikarar úr bæ›i samgongu og andstø›u vi›gjørdu í gjár ríkisrættarligu stø›u Føroya fyri stongdum dur›um saman vi› f‡ra høgt mettum útlendskum stjórnmálafrø›ingum.

Teir f‡ra serfrø›ingarnir eru komnir til Føroya í sambandi vi› eina rá›stevnu um ymsar st‡risskipanir, sum ver›ur hildin í Nor›urlandahúsinum í dag.

Rá›stevnan ver›ur hildin í sambandi vi› umfatandi politisku umrø›una av, hvussu framtí›ar ríkisrættarliga stø›an hjá Føroyum skal vera. Og í tí sambandi hildu fyrireikararnir ta› vera hóskandi, at føroyskir politikarar sluppu at vi›gera ríkisrættarligu stø›una í afturlætnum forum saman vi› serfrø›ingunum.

Bogi Eliasen, sum er ein av stigtakarunum til rá›stevnuna, sigur, at talan er um eina fakliga rá›stevnu, sum skal l‡sa møguleikarnar bæ›i sambandsvegin og loysingarvegin.

Teir f‡ra stjórnmálafrø›ingarnir eru úr Danmark, Skotlandi, Onglandi og USA. Teir eru allir kend nøvn í stjórnmálafrø›ini.

Oddamenninir fyri føroysku flokkarnar vóru í gjár í Nor›urlandahúsinum á fakligum fundi um fullveldismáli› fyri stongdum dur›um

Sylverius tekur sæti á tingi

Dagurin í gjár var fyrsti dagurin á tingi hjá Sylverius Jacobsen av Skála

JOHN JOHANNESSEN

Í gjár tók Sylverius Jacobsen av Skála á fyrsta sinni sæti á tingi. Sylverius umbo›a›i Javna›arflokkin sum varama›ur fyri Dan Reinhert Petersen úr Fuglafir›i.

Vanliga plagar Andreas Petersen, sum er næst valdur fyri Javna›arflokkin í Eysturoynni, at vera varama›ur á tingi fyri Dan Reinhert Petersen. Men hesafer› lá hetta ikki fyri hjá Andreasi Petersen. Tí mátti tri›j valdi ma›urin í Eysturoynni, Sylverius Jacobsen, tra›ka til.

Sylverius Jacobsen fekk 175 atkvø›ur til løgtingsvali› í 1998, Andreas Petersen fekk 186 atkvø›ur og Dan Reinhert Petersen fekk 194 atkvø›ur.

Ein annar eykalimur var eisini á tingfundi í gjár. Hetta var Mami Dahl Sørensen úr Javna›arflokkinum. Hon var varama›ur fyri Vilhelm Johannesen, sum hevur veri› burtur vegna sjúku. Vilhelm Johannesen tekur sæti aftur á tingi í dag.

Vit eiga eisini at atkvø›a um evruna

JOHN JOHANNESSEN

Føroyar og Grønland eru partur av danska ríkinum. Tí eiga føroyingar og grønlendingar eisini at sleppa at atkvø›a, um evran skal loysa krónuna av sum gjaldoyra.

Hetta heldur danski ES-tinglimurin, Jens-Peter Bonde úr Juni rør›sluni.

Jens-Peter Bonde sigur í vi›merking í Jyllands-Posten, at ta› tykist ikki serliga fólkaræ›isligt, at føroyingar og grønlendingar ikki eisini ver›a spurdir, um teir vilja hava evruna, tá bæ›i londini í mi›lunum hava sagt seg vilja n‡ta evruna.

– Um Danmark sigur ja til at n‡ta evruna, skal danska krónan burtur. Men formliga hava vit møguleika fyri at var›veita krónuna sum gjaldoyra í Grønlandi og í Føroyum, sigur Jens-Peter Bonde.

Føroyskir politikarar hava eisini á›ur gjørt vart vi›, at føroyingar áttu at sloppi› at atkvøtt um evruna. Men landsst‡ri› hevur í sambandi vi› fullveldissamrá›ingarnar gjørt greitt, at ta› ynskir evruna sum gjaldoyra í Føroyum.

Danska fólkaatkvø›an um evruna ver›ur 28. september.

Gekk skjótt at drepa

Klaksvík: Fyrrapartin í gjár leg›i ein springaraflokkur beinini í Klaksvík. Drápi› gekk skjótt og væl fyri seg.

Gott 50 springarar vóru í flokkinum, og skift var› millum tey, sum vóru vi› í drápinum.

S‡sluma›urin í Klaksvík rokna›i á middegi í gjár vi›, at ta› fór at vera klárt at skera upp um tr‡tí›ina.

Ta› gekk væl at drepa teir um 50 springararnar í Klaksvík í gjár.

Mynd: SJH

N‡ggja Norröna broytir havnarmyndina

N‡ggjur rampi til Norrönu og Smyril skal gerast á Bursatanga. Farmalei›ir hjá Strandfer›sluni skulu flytast av havnarøkinum og Eimskip skal byggja pakkhús á n‡ggja havnarlagnum. Hetta eru nakrar av broytingunum, sum Tórshavnar Havn hevur stungi› út í korti›

EIRIKUR LINDENSKOV

Ta› fer at krevja nógv av Tórshavnar Havn, tá Smyril Line í 2002 fer at seta n‡ggju Norrönu í sigling. Sjálv ferjulegan skal broytast, men pláss skal eisini gerast fyri nógv fleiri bilum á bryggjuni, enn ta› er í dag, tí n‡ggja skipi› tekur fleiri enn tríggjar fer›ir so nógvar bilar.

– Vit mugu brei›ka og leingja su›ureftir rampan á Bursatanga, har Norröna í dag leggur at, solei›is at Smyril kann liggja uttan á rampanum, sigur Tórfinn Smith, forma›ur í havnarnevndini.

Men eisini innan fyri bryggjukantin ver›a broytingar at fara fram. Strandfer›slan hevur sí›ani 1991 leiga› nor›rasta pakkahúsi›, sum er innrætta› til farstø› og til Farmalei›ir hjá Strandfer›sluni. Hetta ver›ur helst broytt í framtí›ini, tí havnarmyndugleikarnir hava í hyggju at taka burtur tann partin av pakkhúsinum, sum h‡sir Farmalei›um fyri á tann hátt at gera meira pláss til bilar á bryggjuni.

– Ta› er av álvara fari› at treingja um á havnarøkinum, og vit ver›a noydd at økonomisera vi› plássinum - serliga nú nógv fleiri bilar fara at ver›a fluttir vi› Norrönu, sigur Tórfinn Smith, sum vísir á, at partur av virkseminum hjá Framalei›um ikki n‡tist at ver›a á havnarlagnum.

– Ta› er ikki ney›ugt, at bilar frá heilsølum í Havn koyra oman á bryggjuna at umskipa farm, sum ver›ur fluttur vi› bilunum hjá Farmalei›um, heldur Tórfinn Smith, sum leggur afturat, at sjálvandi skal farmur frá skipum handlast á bryggjuni.

Tórfinn Smith sigur, at ta› ver›ur trupult at útvega pláss til 1.000 bilar á havnarlagnum.

– Men vit hava eisin tosa› um eitt parkeringsdekk, at til ber at hava básar í fleiri hæddum. Hóast eingi neyv tøl finnast um hetta, so hava vit kortini fingi› so miki› at vita, at hetta ber til, sigur hann.

Tørvur ver›ur á nógv meiri plássi til bilar á bryggjuni, tá n‡ggja Norröna fer at sigla í 2002. Hon tekur fleiri enn tríggjar fer›ir so nógvar bilar, og tí ætlar Tórshavnar Havn at taka burtur eystara partin av hesum pakkhúsinum, sum h‡sir Farmalei›um hjá Strandfer›sluni

Mynd: Álvur Haraldsen

Eimskip byggja í Nyhavn

Íslendska flutningsfelagi›, Eimskip, hevur seinnu árini økt munandi um virksemi sítt í Føroyum. Hetta sæst t‡›uligast á havnarlagnum í Havn. Sum er hevur felagi› til húsa í pakkhúsinum hjá Tórshavnar Havn, sum bygt er nor›ur úr gamla bygninginum hjá P/F Kartna Winther. Men har er alt ov trong, og hevur felagi› fingi› til vega øki yviri vi› Strond til umsitingarbygning.

Tórfinn Smith váttar, at havnarmyndugleikarnir eisini hava tosa› vi› Eimskip um at byggja n‡tt pakkhús úti í N‡havn - á n‡ggja havnarlagnum. Eingin avger› er kortini tikin - heldur ikki, um ta› skal ver›a Tórshavnar Havn sum byggir ella Eimskip.

– Ta› eru ikki ognarvi›urskiftini, sum eru altavgerandi fyri okkum - men heldur endamáli› vi› bygningunum, sigur Tórfinn Smith.

Tórshavnar Havn eigur allar bygningarnar á bryggjuni - og geva teir eisini heilt fitt av leiguinntøku til Tórshavnar Havn.

Nær ætla›u broytingarnar fera í gongd er ikki greitt enn, men í øllum førum skal arbei›i› ver›a lig›ut, tá n‡ggja Norröna fer i sigling um sløk tvey ár.

Av ø›rum størri íløgum í Tórshavnar Havn í framtí›ini nevnir Tórfinn Smith, at einafer› ver›ur uttari molin longdur solei›is, at ta› fer at bera til at gera eina atløgubryggju á uttaru sí›u á innara molanum.

– Tá fáa vit samstundis eina nógv djypri havn. Sum er klára stóra farmaskipini akkurát at leggja at á molanum - og sum gongdin er kunnu vit bara vænta, at skipini gerast størri og størri.

Nær hetta arbei›i› kann fara í gongd er ilt at meta um - og Tórfinn Smith vísir á, at hetta eisini er tengt at íløgukarminum hjá kommununi.

Strandfer›slan vil vera á bryggjuni

Vit røkja okkara uppgávu best vi› at hava alt virksemi› á einum sta›, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni

EIRIKUR LINDENSKOV

– Ta› besta fyri okkum er, at Farmalei›ir vera ver›andi á bryggjuni.

So grei›ur er stjórin á Strandfer›sluni, Reidar Nónfjall, tá vit bi›a hann um vi›merking til ynski› hjá Tórshavnar Havn um, at partur av virkseminum hjá Farmalei›um skal fytast av havnarlagnum.

Reidar Nónfjall sigur, at Strandfer›sluni er álagt at røkja farma- og fer›afólkaflutning til hvønn krók í landinum - at »nøkta landsins tørv«, og henda arbei›ssetning ætlar hann at halda.

– Vit hava tí nøkur ynski til Tórshavnar Havn, sum teir tíverri ikki kunnu nøkta. Men eg síggi hetta ikki sum ein trupulleika hjá Strandfer›sluni, tí vit hava ein leigusáttmála, sum ikki kann sigast upp fyrr enn í 2011. Tískil er hetta ein trupulleiki hjá Tórshavnar Havn, sigur Reidar Nónfjall.

Hann vísir kortini á, at Strandfer›slan fleiri fer›ir hevur bi›i› um grei› bo› frá Tórshavnar Havn um, hvat teir ynskja í framtí›ini, og hann sær hetta skrivi› sum ein li› í hesi tilgond.

– Vit tosa væl saman, og eg skilji væl trupulleikan, men skulu vit gera okkara arbei›i› til lítar, so er best, at vit vera ver›andi á bryggjuni vi› øllum virkseminum á einum sta›. Á henda hátt røkja vit uppgávuna best, sigur hann.

Reidar Nónfjall heldur ta› ikki ver›a rætt, tá sagt ver›ur, at Farstø›in er eitt umskipingarsta›.

– Vøruna, sum vit koyra fyri P/F Poul Hansen heinta vit uppi á Hálsi. A›rar vørur, sum vit koyra í smærri mongdum - eisini fyri heilsølur, koyra vit náttúrliga frá Farstø›ini, sigur stjórin á Strandfer›sluni.

Reidar Nónfjall skilir væl, at ta› er trupult hjá Tórshavnar Havn at h‡sa øllum virkseminum, sum er økt sera nógv seinnu árini. Men hann er ikki heilt samdur í, at ta› er rætt at flyta virksemi hjá Strandfer›sluni av havnarøkinum.

– Hvussu gera tey a›rasta›ni? Hava tey stórar byngjuhavnir mitt inni í hjartanum í b‡num? Ella flyta teir samfer›sluvirksemi út um b‡irnar, spyr stjórin, uttan tó sjálvur at koma vi› einum svari.

Reidar Nónfjal vísir eisini á, at ta› eisini átti at havt áhuga hjá Tórshavnar B‡rá›, at ta› ver›ur tiki› væl ímóti bygdafólki, sum koma til Havnar.

– Hetta átti sjálvandi at veri› ein vinningur fyri b‡in, heldur hann.